STUTT SAGT

## Sermerktur túrur til Lokloysi

**Sandoy:** Sunnudagin 13. august skipar Sandoyar Kunningarstova fyri túri til Lokloysi.

Lokloysi er eitt sermerkt stað, ið liggur norðast á vestursíðuni á Sandoynni. Her er náttúruhavn, sum fyrr varð nýtt hjá bátum at seta upp í.

Á túrinum, sum byrjar kl. 14 verður Karlot Petersen ferðaleiðari. Prísurin er 280,00 við matpakka og kaffi.

Sagt verður, at tað er avmarkað luttøka.

**sb.**

## Vindmyllur og panorama hjá ferðafólki



*Vindmyllurnar í Nes Haga standa í sera náttúruvøkrum øki*
*Mynd: Nes kommuna*

**Nes:** Hóast mong kanska halda, at tær fýra vindmyllurnar í Nes Haga ikki eru so vakrar á at líta, er kortini líkt til, at fólk vitja hetta staðið.

Orsøkin til hetta er, at á staðnum har vindmyllurnar standa er eitt so avbera vakurt útsýni í mangar ættar. Trupulleikin hevur higartil verið, at vegurin ikki var asfalteraður, men tað er hann nú.

Tann góðar 2 km. langi vegurin, sum gongur tvørtur um eitt náttúruvakurt lendi, er í summar vorðin asfalteraður av Sev.

Nú vegurin til vindmyllurnar er vorðin asfalteraður, metir Nes kommuna, at hann kann vera til stóra nyttu hjá ferðavinnuni og fólki annars.

– Økið er eitt satt panorama, við útsýni í allar ættir, verður sagt.

Kommunan ætlar at seta upp vegskeltir upp við vegin, eins og borð, stólar og ruskíløt. Á henda hátt kunnu tey ferðandi seta seg niður at njóta túrin og ta sera vøkru náttúru, sum er í økinum eystur á Eystnes.

**sb.**

## Fjúrtandi trolarin til fiskiskap

**Samherji:** Trolarin, sum hetlendingar herfyri seldu til íslendsku fyritøkuna Samherji, er nú farin til fiskiskap. Talan er um trolaran Serene, sum nú ber heitið Margrét.

Blaðið Shetland Times skrivar, at reiðaríið Samherji eigur 14 stórar trolarar, sum m.a. eru keyptir úr Týsklandi, Grønlandi, Bretlandi – og Føroyum.

Serene er annar trolarin sum Samherji keypir úr Hetlandi. Hann kemur ístaðin fyri ein annan og eldri trolara, sum ikki er til fiskiskap longur.

**sb.**

# – Fekk áræði og gleði til uppgávurnar

**Seinast í hesum mánaðinum kemur New Zelendski psykoterapeuturin Pauline Skeates til Føroyar at halda skeið.**

**– Eg havi verið á fleiri skeiðum hjá Pauline. Her gjørdist Gud meiri livandi og umsorgarfullur fyri mær, sigur Hilda Viderø úr Klaksvík, sum skipar fyri hesi vitjanini**

VITJAN
*Snorri Brend*



*Pauline Skeates er nógv eftirspurd sum skeiðhaldari. Nú kemur hon til Føroya at undirvísa leiðarum innan kirkjur og samkomur*

**Sálarfrøði:** – Á hesum skeiðunum havi eg verið sera fegin um ta menning, og tey amboðini eg fingið at arbeiða við.

– Nú vil eg geva øðrum føroyingum møguleika fyri hesum sama, sigur Hilda, sum dagliga starvast sum familjuterapeutur og supervisor.

Pauline Skates er sálarfrøðingur og psykoterapeutur, og hevur seinastu fimm árini undirvíst í kirkjum og samkomum í mongum londum í Europa.

Høvuðsevnið á øllum hesum skeiðunum hevur verið, hvussu tað andaliga lívið hjá tí einstaka ávirkar kenslulívið, sálina og likamið.

Tað hevur nú eydnast at fáa Pauline til Føroya. Skeiðið verður í døgunum 28. og 29. august, og er ætlað leiðarum innan kirkjur og samkomur, og fyri fólki sum arbeiða við sálarrøkt innan samkomurnar.

**– Brúk fyri tí**

Júst hetta við kenslulívinum, sálini og likaminum hevur stóran áhuga hjá Hildu Viderø í arbeiði sínum.

Hon hevur tí verið á skeiðum hjá Pauline seinastu tvey árini, og veit tí, hvønn boðskap henda nógv eftirspurda kvinnan hevur at bera fram.

– Á hesum skeiðum var varpað ljós á mína Gudsmynd. Hetta kendi eg sera gott og týdningarmikið, tí Gud á henda hátt gjørdist meiri livandi og umsorgarfullur.

– Hetta hevði eg so avgjørt brúk fyri, sigur Hilda.

Eftir skeiðini hevur hon merkt, at hon hevur fingið størri frímóð, og ikki minst gleði at fara undir tær uppgávurnar, sum liggja fyri framman.

Hetta tilboðið ætlar hon nú at geva víðari til ábyrgdarfólk innan kirkjur og samkomur. Annars eru øll vælkomin á skeiðið, sum ynskja størri kunnleika til tann andaliga tørvin og hvussu ein persónur er samansettur.

Skeiðið er á enskum máli. Men sum skilst er Pauline Skeates von at undirvísa á enskum, og er tí løtt at skilja.

# Ættleidd skulu fáa síni rættindi

Nevndin í Ættleiðingarfelagnum skipaði seg herfyri við Anju Andreasen sum forkvinnu

20. mai var tann árligi familjudagurin og aðalfundurin hjá Ættleiðingarfelagnum hildin í barnagarðinum á Mýrunum í Runavík. Familjur úr Eysturoynni høvdu fyriskipað dagin.

Luttøkan var góð, umleið 120 vaksin og børn. Tey ættleiddu børnini, ið luttóku, vóru úr hesum londum: Bulsgaria, Etiopien, Indien, Kolumbia, Korea, Kina, Suður Afrika, Tailand og Vietnam.

Byrjað var við morgunmati og síðani vóru nakrir sangir sungnir.

Eftir hetta hevði Bessi Bjarnason, Marte Meo ráðgevi, kunning um Marte Meo háttin, um hvussu Marte Meo verður brúkt til at vegleiða foreldrum í at skapa tilknýti til ættleidda barnið, og at vera mennandi í samskiftinum við tað.

Aftaná døgurða var aðalfundurin. Í meðan aðalfundurin var, varð skipað fyri tiltøkum fyri børnini. Ung fólk úr Eysturoy sungu saman við børnunum og børnini spældu eisini bæði inni og úti í barnagarðinum á Mýrunum, sum var ein frálíkur karmur um hetta tiltak. Bæði foreldur og børn hugnaðu sær óført.

**Nýggir nevndarlimir**

Á aðalfundinum vóru 2 nýggir limir valdir í nevndina, tað vóru Anja Andreasen og Bessi Bjarnason.

Tann 14. juni kom nevndin saman og skipaði seg soleiðis: Forkvinna er Anja Andreasen, skrivari er Bessi Bjarnason, kassameistari er Ann Lindberg og nevndarlimir Annika Marr Poulsen og Poul Geert Hansen.

Eitt sera týdningarmikið endamál hjá Ættleiðingarfelagnum er at fáa í lag samband millum ættleiðingarfamiljur. Felagið vil fegið virka sum samskipari ella sambindingarlið millum familjur.

Í viðtøkunum hjá felagnum stendur, at Ættleiðingafelagið virkar m.a. fyri, at øllum verður givin somu rættindi, uttan mun til uppruna. Felagið virkar eisini fyri at ættleidd verða integrerað í tað føroyska samfelagið, og at kunna um ættleiðing, har tørvur er á tí eins og tey umboða áhugamálini hjá felagnum mótvegis myndugleikunum.

Ættleiðingarfelagið er altíð til reiðar at hjálpa og vegleiða um ættleiðing. Felagið hevur tilknýti til, heilsusystir, fysioterapeut, talupedagog og áhugabólkar, sum ein kann venda sær til, um ein hevur ættleitt eitt barn ella hevur ætlanir um at ættleiða eitt barn.

Ættleiðingarfelagið hevur eina heimasíðu, www. aettleiding.fo Har ber til at fáa ymiskar upplýsingar um ættleiðing, somuleiðis ber eisini til at senda fyrispurningar inn til felagið.

**sb.**

# Langt eftir á mál hjá psykiatri'ini

**Hóast psykiatri'in hevur verið fyri mundandi framstigum seinastu árini, ásannar landsstýrið at enn er langt á mál**

HEILSA

Í nógv ár hava trupulleikar verið á psykiatriska økinum. Hetta kemst millum annað av, at ein ikki hevur havt nakra økispsykiatri ella sosialpsykiatri, og hetta hevur ovbyrjað sjúkrahúspsykiatri'ina á Landssjúkrahúsinum.

Seinastu árini hevur støðugt verið arbeitt við at skipa allar partar av psykiatri'ini betur m.a. við at gera eina heildarpsykiatri í Føroyum.

– Økispsykiatri er sett í verk, og ætlanin er at menna hana komandi árini, stendur at lesa í fylgiskjølum til løgmansrøðuna.

Innan sosialpsykiatri'ina er stuðulsskipan fyri sinnisveik sett á stovn, sambýli til sinnisveik eru fingin til vegar og bygginevnd er sett at fyrireika búpláss til brúkarar, ið hava serligan tørv á hjálp.

Psykiatriski depilin hevur eisini arbeitt við at dagføra viðgerðartilboðini, m.a. við at leggja meira um til ambulantar viðgerðir, gera viðgerðarætlanir fyri sjúklingar og dygdarmenna viðgerðarskipanina.